# Arbeiðsgevarar púra samdir við Løgmanni

**– Onki samfelag kann virka undir hesum treytunum og tí mugu viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum skipast betri, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Tað ber illa til at vera ósamdur við Løgmanni.

Arbeiðsgevarafelagið tekur fult undir við Løgmanni, tá ið hann í Sosialinum sigur, at ein avleiðing av hesum verkfallinum má vera, at vit fáa betri skipað viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum.

Løgmaður heldur ikki, at samfelagið tolir ósemjur sum hesa, sum nú hevur vart í fýra vikur og tí má tað politiskt raðfestast frammaliga at fáa betri viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum.

Hesum er Jan Mortensen púra samdur í.



*Arbeiðsgevarar hava onki ímóti, at reglarnar fyri frumatkvøðugreiðslu verða broyttar fyri at gera tær meiri demokratiska, sigur Jan Mortensen á arbeiðsgevarafelagnum*

Hann vísir á, at seinastu árini eru fleiri royndir gjørdar at skipað viðurskiftini betri.

– Men higartil hevur tað víst seg, at fakfeløgini hava ikki verið sinnað at vigjørt hesi viðurskifti í álvara.

Hann vísir á lógina um seming, sum er frá 1928 og tískil er ótíðarhóskandi.

Hann sigur, at tað er eisini neyðugt at fáa eitt ella annað amboð til at loysa trætur á arbeiðsmarknaðinum við.

Hann sigur, at vit kunnu kalla tað arbeiðsrætt ella okkurt annað.

– Tað, sum er ein stórt mál í hesum sambandi er spurningurin um frumatkvøðugreiðslur, har limirnir í einum fakfeløg sleppa at atkvøða um sáttmálauppskot fyri at gera av, um farast skal í verkfall ella ikki.

– Hetta er ein aðaltáttur í øllum londum rundanum okkum og í Danmark hava fakfeløgini tað í sínum egnu lógum, at limirnir skulu gerast.

– Tað hava fakfeløgini í Føroyum ikki. Men vilja fakfeløgini í Føroyum ikki hava demokrati í sínum egnum lógum, má samfelagið seta demokratiskar lógir í gildi fyri tey.

Hann veit av, at fakfeløgini kalla frumatkvøðugreiðslurnar ódemokratiskar tí fyri at eitt semingsuppskot skal fella, skulu minst 75% av limunum taka lut í atkvøðugreiðsluni. Sostatt ber skipanin við sær, at tey, sum ikki taka lut í atkvøðugreiðsluni, verða roknað at hava atkvøtt fyri semingsuppskotinum.

Jan Mortensen sigur, at eru arbeiðarafeløgini ónøgd við atkvøðuháttin, ber tað til at broyta tað.

– Arbeiðsgevarafeløgini hava onki ímóti at reglarnar fyri frumatkvøðugreiðslu verða broyttar- í hvussu so er eitt sindur.

Hann sigur, at í Danmark eru reglarnar fyri frumatkvøðugreiðslu øðrvísi enn í Føroyum.

– Men har er tað kortini so, at er áhugin hjá fakfelagslimunum at taka lut í atkvøðugreiðsluni ikki nóg stórur, telur tað til fyrimunar fyri samfelagið og tað er at fáa ein enda á eini arbeiðsósemju, sum hann sigur.

Jan Mortensen sigur, at tað er avgjørt neyðugt, at broytingar henda nú, tí tað eru vinnur, sum als ikki bera til í Føroyum av teirri orsøk at viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum eru so ótrygg.

Hann hugsar m.a. um Bitland verkætlanina, sum miðjar eftir at gera Føroyar til eina royndarstøð fyri nýmótans kunningartøkni.

– Tað ber ikki til at hava eina slíka royndarstøð, sum liggur lamin í ein mánað, sigur Jan Mortensen.

# Fáa ikki gjørt meir fyri at fáa enda á verkfallinum

**– Útlitini fyri at fáa ein enda á verkfallinum eru vánalig, heldur arbeiðsgevarafelagið**

VERKFALLIÐ
*Áki Bertholdsen*



*Vit hava latið oljugoymslur og heilsølur uppaftur fyri at vísa ein góðan vilja, sigur Jan Mortensen á arbeiðsgevarafelagnum*

– Vit kunnu ikki gera meiri fyri at fáa eina enda á verkfallinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað kann ikki gera nógv við inniligu áheitanina frá Løgmanni í Sosialinum leygardagin.

Løgmaður heitti í blaðnum staðiliga á partarnar um at vísa samfelagssinni og at fara til samráðingar aftur beinanvegin, tí hetta tolir samfelagið ikki.

– Hetta var ein áheitan frá sjálvum løgmanni og hana tóku arbeiðsgevararnir í fullum álvara, sigur Jan Mortensen, hjá arbeiðsgevarafelagnum.

Tí kallaðu arbeiðsgevararnir til fundar beinanvegin at viðgera støðuna.

Men úrslitið er tað sama.

Arbeiðsgevararnir hava longu svarað Løgmanni, at teir halda ikki, at teir fáa gjørt meiri fyri at loysa knútin.

– Vit halda, at vit hava víst ábyrgd og samfelagssinni. Vit hava longu slakað væl meira enn upprunaliga ætlað og vit tók undir við báðum semingsuppskotunum, sum semingsmenninir løgdu fyri partarnar, sigur Jan Mortensen.

– At vísa samfelagssinni er ikki bara at loysa ein knút beint nú. Vit skulu eisini liva í hesum samfelagnum í nøkur ár afturat og tað mugu vit eisini hugsa um og amfelagið ber ikki eina stóra lønarhækking nú, leggur hann afturat.

Jan Mortensen sigur, at tvørtur ímóti heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag avgjørt, at tað hevði verið samfelagsliga ábyrgdarleyst at slaka meira í lønarsamráðingunum.

– Ótálmaður lønarvøkstur hóttir arbeiðspláss og skaðar kappingarførið hjá útflutningsvinnuni, sum er búskaparliga grundarlagið undir føroyska samfelagnum.

Hann sigur, at tí vera tað ikki arbeiðsgevararnir, sum fara at kalla saman aftur til samráðingar.

– Vit hava góðtikið tvey semingsuppskot. Tað hava arbeiðarafeløgin ikki og tí eiga tey næsta leikin. Og hava tey nakað at tosa við okkum um, frætta vit ivaleyst frá teimum, sigur Jan Mortensen.

### Stongdu fyri at mótmæla

Arbeiðsgevarafelagið harmast annars um, at verkfallið eisini rakar onnur enn fyritøkur og arbeiðsfólk, sum eru í verkfalli.

Og Jan Mortensen finst enn einaferð at blokadunum, sum arbeiðarafeløgini hava sett í verk og um hann enn einaferð kallar bæði ólógligar og ómoralskar.

– Fyri at mótmæla hesum, varð mikudagin gjørt av stongja oljugoymslur og heilsølur

– Men nú útlitini fyri semju eru so vánalig, fer arbeiðsgevarafelagið kortini at gera sítt til at linna tað kroystu støðuna, sum Føroya fólk er komið í av verkfallinum.

Hann sigur, at tí varð gjørt av, at heilsølur og oljusølur, sum hava verið stongdar síðan mikudagin, skuldu lata uppaftur í gjáramorgunin.

– Hetta gera vit fyri at gera okkara til at fáa fólki vørur aftur. Fara arbeiðarafeløgini so aftur at blokera, mugu tey so eisini taka skyldina á seg fyri tær vørur, sum fólk mangla, sigur Jan Mortensen.

Hvussu bar tað til, at tit lótu uppafturm, er tað nakar, ið hevur kroyst tykkum til tað?

– Nei, men nøkur av ringt til okkara ísambandi við, at avleiðingin av hesum hevði verið, at Smyril varð lagdur, sigur Jan Mortensen.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá arbeiðarafeløgunum áðrenn blaðið fór til prentingar í gjár.





*Eingin fiskur er farin eftir bandinum inn í Kloosterboer í Kollafirði, síðan verkfallið byrjaði. Verkfallið hevur kostað virkinum 5 milliónir krónur, sigur Johan Dahl, stjóri, sum lastar pørtunum á arbeiðsmarknaðinum fyri vánaligt samráðingarhegni*

# Verkfallið er ein vanlukka fyri frystivirki

**Árið er oyðilagt fyri Kloosterboer Terminal í Kollafirði og Faroe Cold Stores í Vági, sum hava mist 6,5 milliónir krónur í inntøku av verkfallinum. Nú er tíðin komin, at løgtingið loysir málið, tí landsins virði fara fyri skeyti, og partarnir hava hvørki hegni ella viljan, sum skal til, heldur Johan Dahl, stjóri og løgtingsmaður**

VERKFALL
*Ingi Rasmussen*

– Hetta er ein katastrofa fyri okkum og alt Føroya land.

Johan Dahl, stjóri á frystivirkjunum Kloosterboer Terminal í Kollafirði og Faroe Cold Stores í Vági, er í døpurhuga í hesum døgum.

Higartil hevur fastfrysta støðan á arbeiðsmarknaðinum kostað honum nógvar milliónir og mistar sáttmálar, sum annars vóru komin undir land. Og tað er pørtunum á arbeiðsmarknaðinum fyri at takka, sigur ein bersøgin stjóri og løgtingsmaður.

### Árið oyðilagt

Bæði virkini í Kollafirði og Vági hava verið noydd at brotið avtalur, sum longu vóru gjørdar.

– Í Kollafirði høvdu vit fingið sáttmála at frysta 6.400 tons av agni í eitt heilt ár. Skip kom á Kollafjørð sama dag, sum verkfallið byrjaði, men slapp ikki at landa. Vit bóðu um undantak og fingu onki. Skipið lá og bíðaði í fýra dagar, til tað fór til Noregs við lastini. Har ruku 5 milliónir krónur í inntøku í einum.

– Í Vági var sama skilið. Avtala varð gjørd við Murmansk Trawl Fleet um at leggja 2400 tons inn á virkið, men onki undantak fekst frá fakfeløgunum í verkfalli. Í staðin varð frystigóðsið lagt um á Redini í Havn. Har fór 1,5 millión krónur fyri skeyti, sigur Johan Dahl.

Tilsamans hevur verkfallið sostatt kostað frystivirkjunum hjá Johan Dahl hálva sjeyndu millión krónur higartil.

– Árið er oyðilagt fyri okkara viðkomandi. Ársins yvirskot er burtur. Kollafjørður hevur mist alt, og í Vági er illa statt. Haraftrat kemur, at vit missa kundarnar, tí teir koma ikki aftur aftaná eina slíka viðferð. Hetta sær øgiliga keðiligt út fyri okkum, sigur Johan Dahl, sum ikki torir at spáa, hvussu framtíðin nú sær út.

### Einki hegni

Johan Dahl leggur ábyrgdina yvir á samráðingarpartarnar. Teir eru slopnir alt ov lætt, heldur hann.

– Teir hava als ikki gjørt nóg mikið til at semjast. Partarnar hava bara sitið hvør sær og kastað runu eftir hvørjum øðrum, so tað er væl skilligt,at semingsmenninir hava givið skarvin yvir. Fyri mær at síggja er tað líka nógv fólkunum, tað er galið við. Talan er um vánaliga kemi. Tey orka ikki sýnið í hvørjum øðrum, sigur Johan Dahl, sum er deyðatroyttur av afturvendandi verkføllum á arbeiðsmarknaðinum.

Skotbráið at lýsa verkfall er alt ov stutt, heldur hann. Partarnir áttu at tosa saman áðrenn sáttmálarnir gingu út, og freistin at lýsa verkfall skuldi verið longd, so støðan í Føroyum líktist henni í grannalondunum.

### Inntriv neyðug

Nú verður endin kanska, at løgtingið leggur uppí, og tað hevur Johan Dahl ongar trupulleikar av. Tí hetta er komið alt ov langt.

– Verkfallið hevur verið ein katastrofa fyri Føroyar. Alivinnan liggur á deyðastráð, og fiskavirkini hava ikki bara mist stór virði men eisini týðandi kundar. Tað er uppgávan hjá løgtinginum at syrgja fyri, at landsins virði ikki fara fyri skeyti, so eg dugi ikki at síggja nakað galið við, at løgtingið tekur um endan, tá onki annað ber til.

Tá til stykkis kemur heldur hann tað vera líkt til, at partarnir bara bíða eftir politiskum inntrivi.

– Sjálvandi áttu partarnir sjálvir at loyst knútin, men tað tykist, sum teir ikki hava neyðuga hegni og bara bíða eftir, at løgtingið leggur uppí. Og tað er ov vánaligt, sigur Johan Dahl, sum er limur Sambandsfloksins á løgtingi.

Um hann atkvøður fyri einum uppskoti um at steðga verkfallinum, vil hann kortini ikki siga, tí tað er upp til samgonguna at gera av, um løgtingið skal leggja uppí.

# Breyð til tvær vikur afturat

**Rugbreyðið hevur gingið betur enn heitt breyð hjá Gunnleivi, har tað hevur staðið á at nøkta tørvin. Men onki er at óttast, tí bakaríið hevur nóg mikið til næstu tvær vikurnar**

BREYÐNEYÐ
*Ingi Rasmussen*

Tað hevur verið sum í einum sovjetskum bakaríi síðstu vikurnar. Meginpartin av degnum hava hillarnar verið tómar fyri rugbreyð, og tá nakað er at fáa, hava langar bíðiraðir staðið út á vegin.

Fólk hava staðið klár hvønn morgun, tá rugbreyð er komið á hillarnar, og útselt hevur verið eftir lítlari løtu.

Tað hevur ljóðað, at nú skuldi gerið vera uppi, og tí hava fólk roynt at keypt inn undir seg. Men ongin vandi er á ferð, sigur Christian Nielsen, bakari hjá Gunnleivi.

– Vit hava nokk av mjøli og geri til tvær vikur afturat. Gerið var um at vera uppi, men vit hava fingið fatur á nóg mikið til, at vit kunnu halda fram at baka rugbreyð, sigur Christian Nielsen.

Sosialurin skilir, at meira enn 100 kilo av geri eru fingin til vega onkursvegna.

Bakarameistarin sigur seg ongantíð hava verið við til nakað líknandi, sum undir hesum verkfallinum. Bakaríið hjá Gunnleivi hevur bakað breyð sum ongantíð áður. Eitt nú varð bakað í 21 tímar út í eitt seinasta mikudag.

– Líkt er til, at fólk eta nógv meira breyð enn vanligt, kanska tí at epli ikki fáast til matna longur. Men tað kann eisini vera tí, at fólk fylla frystiboksirnar við breyði. Men um fólk annars keypa sum higartil, so hava vit til hesa vikuna og helst næstu viku eisini, og man verkfallið ikki vera av tá? spyr Christian Nielsen.